# Raðfylgjan varð útsett

**Semja er framvegis ikki um, hvussu stigatalvan skal gerast upp, tá lið standa á jøvnum í stigum**


*Tað vóru serliga umboðini hjá HB, sum ikki uttan víðari vildu góðtaka lógargreinina um raðfylgjuna á liðunum. Ein lógargrein, sum teir hildu vera dekan ov fløkta*
*Mynd: Álvur*

FSF-FUNDUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av lógarbroytingunum, sum var í uppskoti, var framferðarhátturin, tá gerast skal av, hvussu støðan á talvuni er, um feløg standa jøvn í stigum.

Ein broyting varð gjørd í hesum í 2000, tá tað varð samtykt, at útfallið av innanhýsis uppgerðum skuldi nýtast, áðrenn roknað varð við málmuni, um lið stóðu á jøvnum í stigum.

### Gloymdu málini

Ta ferðina var grundgevingin, at tað – serliga í yngru deildunum - kundi vera óheppið, at tað fyrst var málmunurin, sum varð roknaður sum avgerandi. Dømi høvdu verið um, at meistaraheiti vórðu avgjørd, tá okkurt av veikaru liðunum ikki møtti til dyst móti øðrum av oddaliðunum. Og tá málmunurin síðani skuldi gerast upp, var tað sjálvsagdur fyrimunur hjá teimum, sum høvdu vunnið stórsigrar, heldur enn at vinna við málmuninum 0-0.

Í lógararbeiðinum ta ferðina hevði eitt mistak tó snikseg inn. Tað var nevnliga ikki staðfest, hvat hugtakið »innanhýsis dystiir« fevndi um.

Og longu fyrsta árið gav hetta at bíta. HB og VB vóru nevnliga jøvn í stigum bara tvey umfør undan seinasta leikdegi. Í sínamillum uppgerðunum høvdu liðini spælt tveir javnleikir. 2-2 í Havn og 0-0 í Vági.

Í Vági hildu tey fast um, at tá VB hevði skotið fleiri mál á útivølli í innanhýsis dystum, vóru teir oddalið. Men tað var ein tulking, sum tey í HB ikki vóru samd í. Málið endaði hjá dómsnevndini, longu áðrenn kappingin var liðug, tí sleppast mátti undan eini støðu á seinasta leikdegi, har eingin visti, hvør var meistari. Úrskurðurin staðfesti, at tá hugtakið ikki var nærri útgreinað, so var talan bara um stig, sum vóru vunnin í innanhýsis uppgerðunum. Her stóðu VB og HB á jøvnum, og so skuldi málmunurin nýtast.

Tá HB á næst seinasta leikdegi misti sigurin á B36 í seinastu sekundunum, fekk hendan lógartulkingin tíbetur ikki nakran avgerandi týdning. Men undirstrikaði týdningin av at hava ein greiðan lógartekst, har eingin ivi skuldi verða um, hvør var fremstur, um fleiri lið standa á jøvnum í stigum.

### Finna eina avgerð

Og tað var eisini hetta, sum uppskotið frá FSF miðaði eftir. Raðfylgjan skuldi nú vera hendan: Stig, stig í innanhýsis dystum, mál í innanhýsis dystum, útivøllarmál í innanhýsis dystum, samlaður málmunur, flest skotin mál og síðani fægst gul og reyð kort. At enda staðfesti teksturin, at stóð framvegis á jøvnum so skuldi umdystur til. Og um neyðugt, so skuldi hesin avgerast við brotssparkskapping.

Hóast uppskotið hevur fingið umrøðu áður, so tóktist vera trupult at finna nakra breiða semju um, hvussu farast skuldi fram. HB skeyt upp, at fyri at létta um hjá teimum, sum fylgja við, skuldi vendast aftur til gomlu skipanina, har mál, málmunur og flest skotin mál vóru avgerandi. Áðrenn uppskotið varð sent til atkvøðugreiðslu, vóru tó fleiri, sum vístu á, at tað er neyðugt at hava greinaðar reglur, soleiðis at tað næstan ikki kemur fyri, at lið standa púrasta á jøvnum. Kanska eisini við at halda fast um uppskotið frá FSF - men tó við broyttari raðfylgju á faktorunum.

### Finna felags stev

Endin á øllum var, at formaðurin bað um at málið varð útsett. Sum nevnt aðrastaðni, so skal FSF kortini hava eykaaðalfund innan alt ov langa tíð, og tí helt hann, at tað mundi ikki gjørt nakað, hvørt málið varð tikið til nýggja viðgerð til ta tíð.

So fæst at vita, hvørt nøkur felags niðurstøða er komin um spurningin til ta tíð. Frá hesum síðum skulu ráðini bara vera, at fyri at halda ítróttarligu virðini í yngru deildunum í hásæti, er týdningarmikið, at innanhýsis dystir - íroknað mál og útivallarmál - verða avgerandi. Í øllum førum í yngru deildunum.

*Hóast orðaskifti var drúgt, so endaði tað kortini við, at ein breiður meiriluti tók undir við, at talan komandi ár verður um beinleiðis niðurflyting hjá tveimum feløgum* *Mynd: Álvur*



har inntøkugrundarlagið er einar 400 tkr. størri, er somikið trongt, at hetta kann vera beinleiðis heilsuskaðiligt. Serstakliga tí feløg kunnu verða noydd at spenna seg somikið hart, at tað er beinleiðis vandamikið fyri pengakassan, um málið ikki verður rokkið.

Orðaskiftið um málið gjørdist rættiliga drúgt, men felagsnevnarin tóktist tó vera, at áskoðanin var ymisk, alt eftir, hvar viðkomandi felag var at finna á stigatalvuni í oktober í fjør. Menn tosaðu eisini við rímiliga stórum bókstavum um ambitiónsstøði, fíggjarráð og annað.

Men endin var tó, at ein breiður meiriluti tók undir við uppskotinum. Bara tvey feløg atkvøddu ímóti, tá alt kom til alt, meðan 13 atkvøður vóru fyri.

Og so mugu vit eisini rætta eitt mistak, sum var íkomið í hósdagsútgávu okkara. Her staðfestu vit, at tað framyvir bert eru nummar eitt og tvey, sum kunnu flyta upp. Nakað sum tó ikki er heilt rætt.

Eigur eitt lið umboðan í ovaru deildini, ber sjálvandi illa til at flyta upp. Tá sleppur nummar trý at flyta upp. Men har steðgar spurningurin um uppflyting so eisini. Tí einki lið lægri enn nummar trý kann fáa henda møguleika.

# Aftur hall í ár

**Fyribils fíggjarætlanin hjá FSF sýnir, at felagsskapurin ikki roknar við yvirskoti í 2006**

FSF-ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum vit nevndu í farnu viku, so var tað ein roknskapur við halli, sum varð lagdur fyri aðalfundin hjá FSF leygardagin.

Í tilfarinum, sum feløgini fingu útflýggjað á fundinum, var eisini fíggjarætlan fyri 2006 hjá FSF. Og hendan vísir, at roknað veðrur eisini við halli í inniverandi ári.

Talan verður tó ikki um nakað heilt stórt hall. 140.490 kr. standa í minus á niðastu regluni, og við verandi fíggjarstøðu er hetta eitt tal, sum FSF kann liva við.

Í longdini er eitt støðugt hall á botnlinjuni tó ikki til at liva við, og tí verður uttan iva neyðugt at leita enn meira eftir nýggjum inntøkum. Hetta hevði Óli Holm eisini á munni, tá roknskapurin varð gjøgnumgingin. Ført varð fram, at FSF í løtuni arbeiðir við at fáa enn meira styrk úr UEFA, eins og samráðingar eru við sportsfive um eina møguliga bonusupphædd í samband við sjónvarpsrættindini. Hetta tí lutakøstini hava verið somikið góð, síðani avtalan á sinni varð broytt. Men í verandi løtu ber tó illa til at staðfesta, hvørt hesar royndir geva úrslit ella ikki. Og tí eru tær ikki roknaðar við, tá fíggjarætlanin fyri 2006 varð løgd.

# Nýggjar FSF-lógir fyri eykaaðalfund

**Arbeiðið við at endurskoðað lógarverkið í FSF hevur verið drúgvari enn væntað. Tí verða føroysku fótbóltsfeløgini kallað til eykaaðalfund í vár, har støða skal takast til nýggju lógirnar**

FSF-LÓGIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í stuttum snúgva broytingarnar seg um, at FIFA hevur ásett ymisk krøv, sum øll sambondini í øllum limalondunum skulu fylgja teimum reglugerðum, sum FIFA hevur út í kortið. Hetta fyri at forða, at eins mál skulu verða handfarin á ymiskan hátt í ymsu londunum. Og fyri at staðfesta, at øll mál verða viðgjørd eftir somu grundreglum, um trætumálið er somikið stórt, at hetta verður beint fyri altjóða ítróttardómstólin í Lausanne.

Umsitingin hjá FSF hevur í hesum sambandi gjørt eitt stórt fyrireikandi arbeiði, og málið varð eisini viðgjørt á fundi við formenninar í ymsu feløgunum í heyst.

Ætlandi skuldi hetta takast upp á aðalfundinum, men seinasta punktum varð tó ikki sett undan aðalfundinum. Ístaðin hava feløgini nú fingið útflýggjað eitt upplegg til hoyringar.

Seinni í vár verður so eykaaðalfundur, har hetta mál verður á dagsskránni. FIFA hevur sett 31. mai sum evstamark fyri at fáa nýggjar lógir, og tí má eykaaðalfundurin haldast fyri hesa dagfesting.

Sami eykaaðalfundur skal ætlandi eisini viðgera sonevnda flytingarvindeygað.

# Leiga verður loyvd

Aðalfundurin staðfesti, at tað nú er loyvt at leiga spælarar millum feløg, uttan at hetta samstundis merkir eina strikan av spæliloyvinum. Formliga hava leigusáttmálar ikki verið partur av lógunum í FSF yvirhøvur, og tí hevur útleigandi felagið á pappírinum givið avkall upp á spælara, tá hesin er læntur úr. Nakað sum væl kundi givið juridiskar trupulleikar, um spælarin skuldi havt lítlan hug at koma aftur.

Samstundis staðfesti nevndin í FSF, at hetta innibar eina broytta siðvenju viðvíkjandi deildu spæliloyvunum hjá yngru spælarum. Lógarkrúllan, sum skapti trupulleikan, skuldi verið burtur við nýggju útgreinini, sum staðfestir rættin hjá feløgunum at søkja um deild spæliloyvi.

-mørk